Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Hervør Pálsdóttir, løgtingskvinna

Svarari: Djóni Nolsøe Joensen, landsstýrismaður í barna- og útbúgvingarmálum

Evni: Skúlakort til lærlingar

Spurningar:

1. Er landsstýrismaðurin sinnaður at kanna møguleikan at veita lærlingum skúlakort, eins og lesandi?
2. Hvat hevði tað kostað, um lærlingar fingu skúlakort í samband við útbúgving sína?

Viðmerkingar:
Í dag er tað soleiðis, at lesandi – bæði á miðnámi og hægri lestri – fáa skúlakort fyri at sleppa aftur og fram frá bústaði til lestrarpláss.

Lærlingar fáa ikki skúlakort, men hava rætt til koyripengar. Tó eru tað nógvir lærlingar, ið eru undir 18 ár, og tískil hava útreiðslur av flutningi, men ikki møguleika til endurgjald.

Við eini lærlingaløn kann ferðaflutningur sostatt gerast ein tungur postur.

Hesin spurningurin verður settur fyri at hoyra, hvat tað hevði kostað, um skúlakort varð latið lærlingum, og fyri at hoyra um landsstýrismaðurin er sinnaður at kanna hendan møguleikan.

Á Løgtingi, 23. januar 2025

Hervør Pálsdóttir